# Tjóðpallur Føroya og tjóðleikhús føroyinga
*-uppskot til hølisloysnir*

## 1. Inngangur

Í juni 2008 setti táverandi landsstýriskvinnan í mentamálum ein bólk at greina hølistørv Tjóðpalsins og at gera uppskot um varandi loysn til tjóðleikhús føroyinga. Verandi landsstýriskvinna hevur valt til at halda fram við arbeiðinum.

Limir í bólkinum eru Jenny C. Petersen, stjóri í Tjóðpalli Føroya, formaður, Jákup Simonsen, mentamálaleiðari í Tórshavnar býráð, og Alda Joensen, fulltrúi í Mentamálaráðnum. Seinni er Jóan Petur Hentze, næstformaður í Leiklistaráðnum, komin upp í bólkin.

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum hevur verið hesin:

- Gera uppskot til loysn á bráðfeingis hølistørvi hjá Tjóðpalli Føroya
- Gera nágreiniliga lýsing av hølistørvi Tjóðpalsins
- Gera uppskot til varandi loysn á hølistørvinum, og harvið uppskot til Tjóðleikhús Føroya, grundað á niðurstøðurnar í pkt. 2

## 2. Tjóðleikhús til yrkisleiklist

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er skrivað, at farið verður undir fyrireikingar til tjóðleikhús. Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum skal síggjast í hesum anda.

Stundum verður røtt um Tjóðleikhús, ið fevnir bæði um leiklist og tónlist, tvs. eitt fleirfunktionelt hús ætlað til at hýsa:

1) yrkisleiklist, tvs. Tjóðpalli Føroya, og sum fevnir um allar palllistagreinar so sum dans/ballet, operu v.m.
2) yrkistónlist, fyrst og fremst Føroya Symfoniorkestri.

Eitt fleirfunktionelt tjóðleikhús í hesum týdningi setir munandi fleiri treytir til sjálvan bygningin, skulu fleiri listastovnar ella yrkislistagreinar framleiða og framføra síni verk undir somu lon um somu tíð. Metast má, at slíkur fleirfunktionellur bygningur verður munandi dýrari at byggja og reka enn eitt teatur.

Í mun til Tjóðpall Føroya, sum er almennur stovnur, er eingin almennur stovnur fyri tónlist e.líkn., men fleiri áhugafeløg/orkestur. Formligi bygnaðurin undir fleirfunktionellum húsi skal tí eisini skipast.

Arbeiðsbólkurin hevur í arbeiði sínum havt fleirfunktionelt hús í huga í mun til eina langtíðarloysn, men hevur lagt dentin á at loysa ítøkiliga hølistørvin hjá Tjóðpalli Føroya, tvs. skjótt at fáa til vegar virðiligar og mennandi karmar til henda stovnin og yrkisleiklistina í Føroyum. Hølini, serliga høvuðspallurin/salurin, eiga tó sjálvandi at kunna nýtast til annað listaligt virksemi eisini, eitt nú til konsertir.

## 2.1. Hví yrkisleikhús

Arbeiðsbólkurin gongur út frá, at landsstýrið í yvirskipaðu mentanarpolitiskari ætlan síni ynskir góðar og virðiligar karmar fyri Tjóðpall Føroya og yrkisleiklist í Føroyum. Eingin ivi er um, at leiklistin – bæði yrkis- og áhugaleikurin – hevur ment seg nógv serliga síðan sjeytiárini, tá ið yrkisleiklistin so smátt byrjaði.

Alsamt fleiri ung velja at taka listarligar útbúgvingar eins og handverksligar útbúgvingar, sum hava tilknýti til list og leiklist. Tað eru eisini fleiri, ið velja list sum vinnuveg, heilt ella lutvíst, hóast trongar fíggjarligar umstøður og virksemismøguleikar.

Yrkisleiklist ella palllist sum heild er eins og øll onnur list sera týdningarmikil fyri fólk – tað veri seg sum einstaklingar ella savnað sum tjóð. Leiklistin styrkir um samleikakensluna, og eitt fólk, ið hevur møguleika at uppliva góða og avbjóðandi list, er á allan hátt betri fyri at taka við teim avbjóðingum, ið koma.

Leiklist á føroyskum máli er harumframt týðandi partur av grundstøðinum fyri varðveitslu av mentanararvinum hjá okkum sum tjóð.

Skal hetta eydnast, er neyðugt við góðum fysiskum karmum, har møguleiki er at framleiða og uppliva leiklist á altjóða støði. Týdningarmikið er eisini, at karmarnir geva rúm og møguleikar fyri framhaldandi menning av teirri føroysku yrkisleiklistini og lógarbundna virkseminum hjá Tjóðpalli Føroya eitt nú í mun til útbúgvingar.

Eitt leiklistarligt verk, sum verður framført á pallinum eitt ávíst kvøld, hevur drúgva forsøgu. Eitt leikrit er skrivað, møguliga týtt, tónleikur er gjørdur, ljóð er sett saman, pallur er smíðaður, búnar seymaðir og ljósið sniðgivið. Harumframt venjingar vanliga í átta vikur, samskipan av ymisku pørtunum umframt annað fyrireikingararbeiði, og at enda sýningar í ein mánaða í minsta lagi. Skal áskoðarin fáa eina so góða heildaruppliving sum møguligt, krevst, at arbeiðshølini til ymisku arbeiðsøkini eru góð og á einum stað.

Kreativitetur og nýhugsan er eitt krav í dagsins samfelagi. Vinnulívið skal støðugt tillagast og mennast fyri at styrkja kappingarførið, samfelagið skal hava atdráttarmegi og tilboð til tess, at fólkið støðist og nørist. Upplivingarbúskapurin er støðugt vaksandi, og eisini í hesum eiga yrkisleiklistin og Tjóðpallur Føroya stóran leiklut.

Umframt fysiskar karmar er eyðsæð eisini neyðugt við fíggjarligum karmum til yrkisleiklistina. Her er neyðugt at viðurkenna, at ein føroysk framleiðsla er ikki bíligari enn ein útlendsk, og góðskan av føroyskari yrkisleiklist kann ikki mátast við áskoðaratalið og inntøkurnar av tí, sum í stóran mun eru avmarkað av íbúgvatali landsins.

Ein ætlan um leikhús til Tjóðpall Føroya má tí eisini setast saman við, hvat játtanarmyndugleikin ætlar at brúka upp á økið. Bygningur og virksemi mugu hanga saman.

## 2.2. Tjóðpallur Føroya í stuttum

Tjóðpallur Føroya varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003. Hann avloysti Leikpall Føroya, sum varð skipaður í 1989, og hetta árið var samstundis fyrsta árið, leiklistin kom á fíggjarlógina. Yrkisleiklistin í Føroyum hevði fram til stovnsetanina av Leikpallinum virkað burturav í og kring Leikbólkin Grímu, sum byrjaði sítt virksemi í 1975.

Sambært grein 5 í lógini skal Tjóðpallur Føroya:

- í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði eins og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk
- geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist - sjónleiki so væl sum aðrari palllist
- tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra
- skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum
- fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum.

Tjóðpallur Føroya skal eisini byggja brýr millum ymisku listagreinirnar so sum tónleik, myndlist, dans o.l.

Um Tjóðpallur Føroya skal menna yrkisleiklistina og á tann hátt vera við til at styrkja áhugaleiklistina, er neyðugt, at arbeiðsumstøðurnar eru so, at livast kann upp til tey krøv, ið lógin ásetur.

Verandi umstøður hjá Tjóðpallinum gera tað sera torført – fyri ikki at siga púra ómøguligt – at røkka endamálinum við lógini. Her verður bæði hugsað um hølisviðurskiftini og um játtanina til Tjóðpallin. Til dømis loyvir játtanin ikki at seta leikarar í fast starv.

Avgerðin um at seta Tjóðpall Føroya á stovn var eitt týðandi stig á leiðini at menna leiklistina. Fyri at røkka á mál mugu nakrar neyðugar íløgur gerast, so at samsvar verður millum politisku visjónirnar og listarliga veruleikan.

## 2.3. Høliskrøv til leikhús til Tjóðpall Føroya

Tjóðpallur Føroya heldur í dag til í niðastu hæddini í Gamla Meiarínum í Tórsgøtu. Tórshavnar býráð eigur bygningin og hevur við vælvild og ásannan av, at Tjóðpallurin – og áðrenn tað Leikbólkurin Gríma – er týðandi aktiv fyri miðbýin, higartil ikki kravt leigu.

Hetta er tó eitt gamalt hús, ið ikki er bygt til endamálið, og hølini liva heldur ikki upp til tey krøv, ið verða sett arbeiðsplássi av hesum slag. Ávís brunaumsjónarlig viðurskifti avmarka virksemið munandi. Hølini eru ov fá og trong, í alt umleið 480 fermetrar, og rúma heldur ikki øllum virkseminum í dag, eitt nú leigar Tjóðpallurin goymslupláss hjá Skipafelagnum.

Pallurin rúmar í mesta lagi uml. 100 áskoðarum, alt eftir uppseting.

Veruleikin er eisini, at Tjóðpallur Føroya kann standa uttan høli um stutta tíð, er ikki ein onnur loysn í eygsjón.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt meting um hølistørv hjá Tjóðpallinum í framtíðini, har virksemið er í hæddini, tvs. ein framtíðartryggjað loysn, ið harumframt er tjóðleikhús føroyinga, tó avmarkað til leiklist.

Mett verður, at samlaða fermetravíddin á hesum bygninginum má vera umleið 3.200. Harumframt koma so onnur viðurskifti, eitt nú parkering.

Hølistørvurin kann býtast upp soleiðis:

- Garasja
- Sveisingarverkstað og goymsla 70m2 (minst 10 m langt)
- Snikkaraverkstað, goymsla og grovverkstað 120m2 (minst 10 m langt)
- Málaraverkstað + ventilatiónsrúm 50m2
- Millumrúm
- Ljós/ljóð verkstað/skrivstova/eykalutagoymsla 60m2
- Ljósgoymsla 40m2
- Ljóðgoymsla 30m2
- Studio 60m2
- Rúm til el + dimmarar 10 m2
- Rekvisitverkstað + goymsla 60 m2
- Teppigoymsla 30m2
- Trossi + rør + bein og podiegoymsla 30m2
- Seymistova 60 m2
- Farvarí  + vaskirúm + turkirúm 60 m2
- Búnagoymsla 100 m2, 2 hæddir
- Rekvisittverkstaður + goymsla 100 m2
- Umklæðingarrúm v/brúsu 10 stk. à 2 pers.
- Upphitingarhøll
- Fundarhølir
- Kaffi- og matarstova starvsfólk
- 6 skrivstovur
- Goymsla skrivstova
- Kopi- og printararúm
- Nærgoymsla til pallar
- Móttøka, foyer, garderoba, vesi v.m. til áskoðarar
- Sølubúð/café
- 1 pallur til 250 persónar
- 1 pallur til 120 persónar
- 1 blackbox

Pallarnir skulu helst hava hædd, ið svarar til umleið 8 metrar.

## 2.4. Møguligar loysnir

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at slíkir fysiskir karmar eru ikki til staðar í Føroyum í dag. Eitt nýtt leikhús til Tjóðpallin á altjóða støði og hesi stødd verður mett at kosta eitt stað millum 125-150 mió kr.

Arbeiðsbólkurin metir ikki realistiskt, at nýtt Tjóðleikhús verður bygt fyri slíka upphædd komandi 3-5 árini. Eisini kann spurningur setast við, um leiklistarliga umhvørvið er nóg stórt til at rættvísgera so stóra íløgu júst nú.

Arbeiðsbólkurin hevur tí kannað møguleikar fyri loysnum, sum bæði kunnu loysa bráðfeingis tørvin, men sum eisini kunnu veita hóskandi og mennandi karmar næstu 15-20 árini uttan at byggja heilt nýtt Tjóðleikhús svarandi til lýsingina av hølistørvinum omanfyri.

Í mun til staðseting av leikhúsinum, hevur arbeiðsbólkurin havt sum týðandi fortreyt, at staðsetingin er í høvuðsstaðnum, og sum er í samsvari við tær ætlanir, ið lógu til grund fyri stovnanina av Tjóðpalli Føroya.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini gjørt sær metingar um, hvar í høvuðsstaðnum ein slíkur bygningur hóskar best í mun til annað mentanarligt virksemið í býnum. Einasti veruligi fyrimunur, sum Tjóðpallurin hevur við verandi Meiaríið, er júst staðsetingin mitt í býnum, eftir mentanarásini Tórsgøtu.

Í mun til tveir aðrar mentanarstovnar – Norðurlandahúsið og Útvarpið, eru hesir merktir av at liggja í útjaðaranum av býnum, har einki av tí, ein miðbýur kann bjóða, og sum altíð hevur verið partur av veruligum teaturumhvørvi, sum vit kenna tað uttanlands, er nærhendis.

Arbeiðsbólkurin er tí samdur um, at staðseting so nær miðbýnum sum gjørligt er besta loysnin. Í miðbýnum er frammanundan eitt virkið mentanarlív, eitt livandi matstovu- og caféumhvørvi eins og aðrir hentleikar, sum stuðla undir eina heildaruppliving, har eisini Tjóðpallur Føroya er virkin partur.

Metast má eisini, at staðseting mitt í býnum samsvarar fult og heilt við áhugamálini hjá Tórshavnar býráð.

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at ábøtur og tillagingar av Meiarínum, har m.a. goymslur, skrivstovur og seymistovur verða flutt í eitt ella fleiri onnur høli/bingjur í býnum, er eingin skynsom loysn rakstrarliga ella listarliga.

Arbeiðsbólkurin mælir greitt til, at onnur loysn enn Meiaríið verður fingin til Tjóðpallin.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini kannað møguleikar fyri at flyta Tjóðpallin í onnur høli í býnum, sum beinanvegin ella rímiliga skjótt kunnu hýsa virkseminum heilt ella lutvíst, antin sum leigari ella samstarvspartur. Her kunnu nevnast Útvarpshøllin, Norðurlandahúsið, Sjónvarpið, Sjónleikarhúsið umframt fleiri størri virkisbygningar.

At leiga seg inn í mentanarbygningar, sum onnur frammanundan virka í – eitt nú Útvarpið, Norðurlandahúsið og Sjónleikarhúsið, hevur nógvar vansar við sær. Hóast

møguleikar fyri tættari samstarvi og synergivinningum, eru royndirnar ofta ringar ikki minst tí, at leigarin fyri so vítt er fremmandur.

Nógvar aðrar praktiskar forðingar eru eisini, tá fleiri sjálvstøðugir stovnar ella partar skulu virka í somu hølum samstundis og á ymsan hátt. Útvarpshúsið er almennur bygningur, sum Mentamálaráðið bert yvirskipað hevur ræðið á umvegis Kringvarpsstýrið. Norðurlandahúsið er fyrst og fremst mentanarstovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum. Sjónleikarahúsið er ogn hjá privatum áhugafelag, sum frammanundan virkar í húsinum við áhugaleiki o.ø. At fáa í lag avtalu, sum inniber, at alt virksemið hjá Tjóðpalli Føroya skal inn í ein av hesum bygningum, fær stórar avleiðingar bæði fyri verandi virksemið í nevndu bygningum, og sanniliga eisini fyri virksemið hjá sjálvum Tjóðpallinum, sum neyðturviliga skal skipa seg í mun til virksemið hjá tí, ið eisini er í húsinum.

Týðandi vansi er eisini, at Tjóðpallurin ongan sjálvstøðugan samleika fær, og her slepst ikki undan, at eisini fysiski karmurin hevur týdning fyri institutionella samleikan.

Arbeiðsbólkurin metir tí greitt, at Tjóðpallurin sum almennur stovnur eigur at hava sín egna bygning til taks, og sum rúmar øllum virkseminum.

## 2.5. Uppskot til haldgóða loysn

Eftir ástaðarvitjan og yvirskipaða meting um byggiteknisk krøv leggur arbeiðsbólkurin her fram eitt uppskot til ítøkiliga og lutfalsliga skjóta loysn, sum lýkur flest øll krøv til nøktandi hølistørv komandi 15-20 árini, menningarmøguleikar og staðseting, og sum harumframt er íløga, ið kann forsvarast.

Ikki bert Meiaríið er í Tórsgøtu. Eisini Bakaríið hjá Frants Restorff´s er í Tórsgøtu. Bygningurin hevur eisini innkoyringarmøguleika frá Magnus Heinasonargøtu.

Bygningurin við tilhoyrandi húsum er í dag uml. 1.150 fermetrar í 5 hæddum. Ávíst fyrivarni skal takast viðvíkjandi gólvvíddini, til neyvari mátingar eru gjørdar.

Til ber at byggja út móti Tórsgøtu fyri á henda hátt at breiðka bygningin og fáa nýtt og opið andlit móti Tórsgøtu.

Saman við hesi útbygging ber til at umbyggja bygningin til leikhús. Til tess at fáa neyðuga hædd til stóra salin/pallin, skal dekkið millum 1. og 2 hædd takast burtur. Samlaða gólvvíddin lækkar tá nakað. Høvuðsbygningurin verður tá at hava 4 hæddir, ið allar kunnu innrættast. Harumframt koma sethús.

Mett verður, at bygningurin kann rúma hesum hølis- og virksemismøguleikum:

- Sal/pall uml. 196 m2
- Verkstaðir ( snikkara-, sveisi- og máliverkstøð)  uml. 108 m2
- Skiftirúm leikarar (8 stk) 80 m2
- Seymistova 40 m2
- Farvirúm + vask + turkirúm 12 m2
- Búnagoymsla 50 m2
- Ljósgoymsla 40 m2
- Ljóðgoymsla 15 m2
- Ljóðstudio 15 m2
- Rekvisittverkstaður 15 m2
- Rekvisittgoymsla 40 m2
- Komuhøll 80 m2
- Móttøka 20 m2
- 4 skrivstovur 48m2
- Vesi áskoðarar 40 m2
- Vesi starvsfólk 20 m2
- Køkur og matarstova 50 m2
- Teppigoymsla 30 m2
- Goymsla podie + bein + rør + uml. l20 m2
- Rúm til el og dimmarar 10m2
- Venjingarhøli/pallur til smærri sýningar uml. 100 m2
- Upphitingarhøll (evt. fundarhøli) 35 m2

Mett verður, at stóri salurin/pallurin kann rúma umleið 150 áskoðarum, kanska nakað meir alt eftir uppseting. Haraftrat er møguligt at gera venjingarhøll, ið eisini kann nýtast til smærri sýningar, upplestur og aðrar framførslur eitt nú fyri børnum, og sum rúmar umleið 50 fólkum.

Umframt sjálvan høvuðspallin, so ber í bygninginum til at hava flest øll verkstøð, skrivstovur, goymslur eins og venjingarhøli. Eisini ber til at gera íbúð til gestaleikstjórar o.líkn. Atkomumøguleikarnir eru góðir, eins og áskoðaraumstøðurnar kunnu gerast munandi betri enn í dag.

Neyðugt er við neyvari tekningum og serkønari ráðgeving um bestu innrættingarloysnir í mun til fjøltáttaða virksemið, ið Tjóðpallurin hevur og skal hava.

Sum heild metir arbeiðsbólkurin tó greitt, at hølistørvurin hjá Tjóðpallinum í dag verður nøktaður við hesi loysnini, og at loysnin harumframt gevur Tjóðpallinum munandi betri møguleikar at menna leiklistarliga virksemið komandi 15-20 árini.

Mett verður, at keyp av bygningi umframt út- og umbygging fer at kosta umleið 50-60 mió kr. Neyðugt er tó við nærri útrokningum hesum viðvíkjandi.

Verður avgerð tikin um keyp í hesum árinum ella fyrst í komandi ári, kann projektering v.m. verða liðugt um heystið 2010. Møguliga kann út- og umbyggjast í stigum, so at Tjóðpallurin kann taka partar av bygninginum í brúk sohvørt. Miðað eigur at verða ímóti, at bygningurin kann takast í nýtslu ársskiftið 2011-12.

## 3. Niðurstøða og tilmæli

Mælt verður til, at landsstýriskvinnan skjótast fer í samráðingar við eigaran um keyp av Bakarínum og tilhoyrandi ognum í Tórsgøtu ætlað til Tjóðpall Føroya, og at játtan verður fingin til vegar til projektering og út- og umbygging á løgtingsfíggjarlógunum fyri 2010-2011, evt. eisini 2012.

Arbeiðsbólkurin metir, at hetta gevur Tjóðpalli Føroya og føroyskari yrkisleiklist hóskandi og mennandi hølisumstøður, sum nøkta tørvin komandi 20 árini.

Metast má eisini, at Tórshavnar kommuna er áhugapartur í verkætlanini, og at Mentamálaráðið við fyrimuni eigur at søkja samstarv við Tórshavnar kommunu um verkætlanina.

Hóast at Bakaríið verður út- og umbygt til leikhús hjá Tjóðpallinum og brúkt sum slíkt næstu 20 árini, eigur stóra framtíðarmálið um nýtt Tjóðleikhús føroyinga, evt. saman við almennum Føroya Symfoniorkestri, ikki at verða slept. Henda ætlan má tó taka skap í samsvari við yrkislistaligu menningina komandi árini.

Tórshavn, 4. desember 2009

| | |
|---|---|
| Jenny C. Petersen | Alda Joensen |
| Jákup Simonsen | Jóan Petur Hentze |